## Útisetar í Sosialinum

**Fólkatalið stendur í stað, nógv fólk flyta niður og búsetast í Danmark ella aðrastaðni. Hvørjar tankar hava hesi fólk haft í samband við flytingina og tað at búgva í Danmark. Rolf Guttesen hevur fyri Sosialin hevur spurt ymisk fólk um teirra áskoðan.**



**Í dag: Randi Joensen**

Randi Joensen av Tvøroyri býr í Ishøj sunnan fyri København. Randi er uppvaksin á Tvøroyri og hevur gingið í fólkaskúla og HF har og útbúgvin lærari í Havn. Hon er soleiðis eitt dømi um ein føroying, sum hevur fingið sína útbúgving í Føroyum, men hevur valt at búseta seg og arbeiða í Danmark

- Hvørja ferð vit vóru í Føroyum við børnunum, søgdu øll: »Kom heim og búgv við teimum, tað er synd í teimum at vera í Danmark«. Men hví tað skal vera synd í teimum at vera í Danmark? Tað fati eg ikki. Tað er eitt gott land at búgva í. Eg dámi, at tingini fungera her, og tað trívist eg við, sigur Randi Joensen.

# Tingini skulu fungera

**Vit hava hitt Randi Joensen av Tvøroyri, sum í dag býr í Ishøj sunnan fyri København. Randi er uppvaksin á Tvøroyri og hevur gingið í fólkaskúla og HF har. Hon hevur arbeitt á flakavirkinum, men fór til Havnar at ganga á læraraskúla. Vit hava valt hana, tí hon er dømi um eina kvinnu, sum hevur fingið sína útbúgving í Føroyum, men hevur valt at búseta seg og arbeiða í Danmark**





**ÚTISETAR**

*Rolf Guttesen*

– Vit vóru tvær vinkonur, sum ikki vóru bundnar av familju og øðrum, og høvdu hug at royna at búgva í Danmark. Vit fóru avstað við einum kufferti, og eg tonkti, at flúgvarin flýgur báðar vegir. Verður tað ikki gott í hesum stóra landinum, so fari eg bara heim aftur.

Vit komu at búgva til framleigu úti á Oyrasundskollegiinum, sum næstan er sum ein føroysk bygd í storbýnum. Vit føldu okkum heima, vit kundu snakka føroyskt hvønn dag, og eisini fara út og snakka danskt og vera millum danskarar.

Eg fekk arbeiði á einari medicinalfyritøku tætt við har sum vit búðu, og har arbeiddi eg eitt hálvt ár. Tað fashineraði meg, at nógvir danskarir kundu brúka hálvar og heilar tímar uppá transport.

### "Eg bleiv vikar 'med delvist fast skema' á Skt. Annæ Gymnasium í Valby"

Eg fekk mítt fyrsta lærarajobb, og bleiv vikar 'med delvist fast skema' á Skt. Annæ Gymnasium í Valby. Og tað var ótrúliga spennandi.

Har var eg eitt hálvt ár. Men so ein penan várdag kom vinkonan heim so glað og tosaði um jobb í Grønlandi. Vit søktu, fóru til samtalu í grønlendska húsinum í Keypmannhavn. Tað var í fínasta ordan, arbeiði í sama býi og hvør sína íbúð, og so fóru okur avstað uppá eina 3-ára kontrakt til Grønlands.

### »Smátt, myrkt og kalt og totalt isolerað«

Eg tonkti, at nú havi eg klárað 27 ár í Føroyum, so kann eg væl eisini klára 3 ár í Grønlandi. Men tað kláraði eg ikki so væl. Tað var næstan beinanvegin, tá ið eg kom har, at eg føldi, hvat geri eg her? Hetta er bara slett ikki eg.

Tað var smátt, myrkt og kalt og totalt isolerað. Tú kundi ikki seta teg í ein bil og koyra til grannabýin. So - eg breyt mína kontrakt, og fór til Danmarkar aftaná eitt ár.

### »Eg føldi, at tað var stuttligari at vera í Danmark enn í Føroyum«

*Var nøkur serlig orsøk til at tú ikki fórt til Føroyar aftur?*

Ja, eg hevði verið eitt ár í Danmark, og eg føldi, at tað var stuttligari at vera í Danmark enn í Føroyum. Og tá lukkaðist at fáa eina íbúð her í Ishøj, og tað var fantastiska gleðiligt. So fekk eg eisini arbeiði, sum eg kundi cykla til uppá 5 minuttir.

### »Tá vit fluttu hertil, stóðu massar av góðum føroyingum klárir at hjálpa«

Tað føroyska sociala netverkið er ótrúliga gott. Tá vit fluttu hertil, stóðu massar av føroyingum klárir at hjálpa. Tað føroyska netverkið vildi eg ikki verið fyri uttan. Men so koma har aftrat nógvir danskir vinir og kenningar. Ótrúliga fitt fólk, sum hava verið góð við míni børn og hjálpt nógv.

Men so er spurningurin, hvar hevur man fingið tað inntrykkið frá, at danskarir eru eitt lukkað fólkaslag, sum ikki blanda seg. Hvaðan hatta inntrykkið er komið, tað veit eg ikki, men tað er so bestemt ikki tað eg havi upplivað.

### »Hví tað skal vera synd í børnunum at vera í Danmark? Tað er eitt gott land at búgva í«

*Hevur tú nakrantíð hugsað um, at flutt til Føroya aftur fyri at seta búgv har?*

Ja, eg havi tonkt uppá tað. Serliga tá børnini vóru lítil. So blivu vit eisini ávirkaði av øllum, sum spurdu hvørja ferð vit vóru í Føroyum við børnunum: »Kom heim og búgv við teimum, tað er synd í teimum at vera í Danmark«. Men hví tað skal vera synd í teimum at vera í Danmark? Tað fati eg ikki. Tað er eitt gott land at búgva í. Eg dámi, at tingini fungera her, og tað trívist eg við!

### »Her trívist eg væl við, at nógv ting lata seg gera«

Eg havi prøvað onkuntíð, tá eg eri komin heim til Føroyar og skal suður við Smyrli, og so situr tú har og veit, at hann skal sigla hálvgum seks, men klokkan blívur seks og sjey og hálvgun átta, og tú situr bara har. Og hann liggur enn í Havn.

Tað var eingin, sum segði nakað um, hví einki hendi, hví hann ikki fór. Passagerarnir hugdu bara spyrjandi uppá hvønn annan og eingin visti nakað. Her trívist eg væl við, at nógv ting lata seg gera, um man vil.

*Í Føroyum verður tosað nakað um, at fólkatalið stendur í stað. Heldur tú at tað er búskapurin, sum er avgerandi fyri, um fólk støðast ella ikki?*

Fyri mítt viðkomandi hevur tað ikki verið avgerandi. Støðan í Føroyum hevur verið góð hesi seinni árini, men eg havi allíkavæl valt ikki at fara heim. Og fyri míni vinfólk trúgvi eg heldur ikki, at akkurát tað hevur nakað at siga. Tey eru framvegis her.

Fólk trívast her! Tað eru nógv fólk, sum trívast væl í hesum landinum. Tað er størri, tað eru fleiri møguleikar. Og allíkavæl er tað ikki størri, enn tú kann yvirskoða tað. Tú blívur ikki vekk í mongdini. Ting lata seg gera uppá ein annan máta!